## Russiskur klaver-snillingur vitjar

KONSERT
*Tíðindaskriv frá konsertfelagnum*

Vestmennningar og havnarmenn kunnu vanta sær eina stóra uppliving viðrussiska klaversnillinginum Alexander Vaulin, sum fer at leika sær á tangentunum í Vestmanna skúla hósdagin 1. febr. kl. 19:30 og í Norðurlandahúsinum sunnudagin 4. febr. kl. 16:00.

Á skránni eru stór norðurlendsk klaververk eftir kend tónaskald eins og danan Gade, norðmannin Grieg og svian Stenhammer, umframt eitt verk av nýggjari dato eftir danan Ilja Bergh.

Fólk kunnu vanta sær klaverspæl á sera høgum støði eftir henda russiska topp-pianist, sum av manglandi frælsi í síni kunstnerisku útfoldan tók sekkin og flutti til Danmarkar í 1989. Vaulin er í Danmark vorðin ein virkin pianistur bæði sum solistur og undirleikari.

Hann er kendur fyri sítt virtuosa og følsama spæl, sum eisini hevur givið honum møguleikar at konserttera víða um í Europa.

Hann hevur innspælt 5 fløgur fyri EMI og Classico og undirvísir m. a. á klaverperfektiónsskeiðum í Portogruaro og Celle-dei-Puccini í Italiu.

## Um at ráðgeva politikarum

TÍÐINDASKRIV

Hvat vænta politikarar av embætisfólki sínum, og hvussu víða eiga embætisfólk at fara, tá tey geva politikarunum ráð? Hetta eru nakrir av spurningunum, ið settir verða á evnisdegi lýst verður við í hjáløgdu skeiðskrá hjá Løgmansskrivstovuni fyri 2001.

Útboðið í skeiðsskránni er fjølbroytt, og fleiri nýggj evni eru á skránni. T.d. er eitt skeið um góðskuleiðslu, sum vit hava fingið Charlotte Qvist Frandsen, marknaðarstjóra á skeiðsfyritøkuni hjá danska verkfrøðingafelagnum, DIEU, at standa fyri saman við Nýskipanardeildini á Løgmansskrivstovuni. Eitt annað skeið er um at luttaka í verkætlanum, sum verkfrøðingurin Mads Barslund, ið starvast á Adcore Implement A/S stendur fyri. Bergur Godtfred, lærari á Handilsskúlanum skipar fyri einum skeiði um munadyggar upprits-hættir.

Umframt nevnda evnisdag um viðurskiftini millum politikarar og embætisfólk, verður lýst við einum evnisdegi fyri skrivarar, har fýra evnið verða viðgjørd: Samskifti og samstarv, at handfara strongd, alnótin sum arbeiðsamboð og almenni starvsfólkapolitikkurin.

Undirvísararnir eru fyri ein stóran part føroyskir, og í ár hava vit eitt skeið um fyrisitingarlógina og lógina um alment innlit og eitt um lógartøkni við føroyskum undirvísarum gjørt út frá føroyskum fortreytum. Men tað er eisini av týdningi at fáa kveiking uttaneftir í føroysku fyrisitinga, og tí er eisini onkur útlendskur serfrøðingur millum skeiðsleiðararnar.

Skeiðsskráin er send aðalstýrum og stovnum landsins, og er eisini at finna á heimasíðuni hjá Løgmansskrivstovuni http://www.fl.fo, sigur løgmansskrivstovan í tíðindaskrivi.

# Skeivt at leggja MRCC støðina og Tórshavnar Radio saman

**– Øll framkomin lond halda at tað vera beinast at hava vatntætt skott ímillum strandarradiostøðir, sum Tórshavn Radio er, og MRCC støðir, sigur Don Petersen, sum er serfrøðingur í samskifti**



*– Øll lond í framkomna heiminum halda at tað er óheppið, at hernaðarligar og hálvhernaðarligar støðir, sum MRCC, fáa valdu á sivilum radiostøðum, sum Tórshavnar Radio. Tí eru tær altíð atskildar, uttan í londum, sum hava hernaðarstýri og í kommunistiskum londum, sigur Don Petersen, serfrøðingur í radiosamskifti*

HAVBJARGINGARSTØÐ
*Áki Bertholdsen*

Tað er ikki rætt at leggja ætlaðu MRCC støðina og Tórshavnar saman. Tí allastaðni í framkomna heiminum verður tað hildið at vera rættast at hava vatntætt skott ímillum MRCC støðir og vanligar radiostøðir, sum Tórshavnar Radio er.

Tað er niðurstøðan eftir at hava tosað við serfrøðing á økinum um málið.

Serfrøðingurin, vit sipa til, er Don Petersen á Tvøroyri, sum í mong ár var leiðari á Radioeftirlitinum.

Síðani Radioeftirlitið og Fjarskiftiseftirlitið vórðu løgd saman, hevur hann verið samskipari hjá Fjarskiftiseftirlitinum.

Yvirhøvur hevur hann drúgvar royndir á hesum øki.

Í mong ár var hann vaktsjefur á Lyngby Radio í Danmark og hann er útbúgvin serfrøðingur í samskifti millum strandarradiostøðir, sum Lyngby Radio og Tórshavnar Radio eru, og MRCC-støðir og SAR støðir. MRCC stendur fyri “Maritime Rescue Coordination Center) og SAR stendur fyri “Search And Rescue”, ella leiting og bjarging á føroyskum.

Landsstýrið hevur tvíhildið um, at MRCC støðin, sum ætlanin er at stovna, má vera í Havn. Somuleiðis er ætlanin at leggja hana saman við Tórshavnar Radio

Vit hava spurt Don Petersen um tað er so avgerandi neyðugt, at MRCC støðin er í Havn, ella um og hon einsvæl kann verða onkustaðni úti á bygd.

Hóast hann er varin í sínum svari, og ikki vil leggja seg út í politiskar avgerðir, kann tað ikki skiljast øðrvísi enn, at støðin kann einsvæl liggja úti í bygd.

Í øllum førum er tað skeivt at leggja MRCC støðina og Tórshavnar Radio saman.

– Tær politisku ætlanirnar skal eg ikki taka støðu til, men sum serfrøðingur á samskiftisøkinum, kann eg púra uttanveltað upplýsa, at í flest øllum heimsins londum sum ikki hava hernaðarstýri, eru strandarradiostøðir og MRCC-støðir atskildar, sigur Don Petersen.

Hann sigur, at hetta er tí, at strandarradiostøðir eru altíð sivilar, men at MRCC-støðir hinvegin eru hernaðarligar, ella hálvhernaðarligar, eitt nú vaktar og bjargingartænastur.

### MRCC í Århus

Don Petersen sigur, at í Danmark er Lyngby Radio ein sivilur stovnur, eins og Tórshavnar Radio er, men at MRCC støðin er hernaðarlig

– Lyngby Radio er í Lyngby tætt við Keypmannahavn og MRCC-støðin, tað sonevnda SOK, Søværnets Operative Kommando, er í Århus.

– Hesir báðir stovnar eru sostatt atskildir, men teir hava gott samskifti við hvørja aðra.

– Eins og Tósrhavnar Radio, hevur Lyngby Radio vakt á á øllum maritimum neyðfrekvensum, alt samdøgurið, alt árið.

– Sendir t.d. eitt eitt skip neyðarkall, hoyrir Lyngby Radio hetta beinanvegin, og tann, sum hevur vakt, boðar alt fyri eitt MRCC-støðini í Århus frá. MRCC-støðin setur so “leiting og bjarging” í verk. Men tað er framvegis Lyngby Radio, sum hevur ábyrgdina av, og samskipar alt radiosamskifti millum tann neyðstadda og bjargingarskip frá MRCC, og tað heldur Lyngby Radio fram við tí, heilt til bjargingararbeiðið er liðugt.

– Alt radioneyðsamskifti millum neyðstadda skipið og bjargingarskip frá MRCC/SAR verður tikið upp á band á Lyngby Radio, og alt samskifti er á altjóða maritimu neyðfrekvensunum, á millumbylgju á 2182 kHz og á VHF á rás 16.

– Tað samskifti, sum MRCC /SAR, hava sínamillum, er hinvegin á loyniligum hernaðarligum frekvensum. Men vil MRCC/SAR hava samband við tað neyðstadda skipið, verður hetta altíð á sivilu altjóða neyðfrekvensunum 2182 kHz og rás 16 sum Lyngby Radio stýrir.

Vit spurdu eisini Don Petersen, hví MRCC støðir og strandarradiostøðir altíð eru hvør sín stovnur í framkomna heiminum?

– Eg havi siglt uppá nærum øll heimsins lond, men tað er bara í gamla Sovjettsamveldinum, í Kina og í Kili undir Pinochetstýrinum, at herurin hevði tikið valdið á strandarradiostøðunum.

– Sum kunnugt er fremsta uppgávan hjá strandarradiostøðum at hava samskifti við skip sum koma í vanda. Men haraftrat hava tær eisini alment samskifti t.d. telefonsamrøður millum skip og telefonfelagar á landi.

– Í Vesturheiminum hevur verið hildið at tað kann vera sera óheppið, um herurin, ella hálvhernaðarligir stovnar, hava valdið á einari sovornari støð.

– Tí hava flest øll lond í veturheiminum hildið at best mundi vera at hava vatntætt skott millum MRCC-støð og strandarradiostøð, sigur Don Petersen.



## TIT SPYRJA VIT SVARA



*Bergur Hanusson, djóralækni*



*Heri Joensen, prestur*



*Heri Kragesteen, sálarfrøðingur*



*Ingi Højgaard, løgfrøðingur*



*Jens Andreassen, lækni*



*Jóhanna á Tjaldrafløtti, føðslu/húsarhaldsfrøðingur*



*Jón Klein Olsen, politistur*



*Jón Kragesteen. Ferðslutrygd*



*Julianna Næs, pedagogur*



*Sjúrður Johannesen, sosialráðgevi*



*Turid Thomsen, lestrarvegleiðari*



*Marius Staksberg, málfrøðingur*

HÚSARHALDS- OG FØÐSLU-FRØÐINGURIN

### Medistapylsa ikki burturkast

Okkum dámar væl medistapylsu. Men í práti ein dagin yvir kølidiskinum í Miklagarði við eina vinkonu, fekk eg líka sum annað at hugsa um. Hon segði, at medistapylsa verður gjørd burtur úr kjøtburturkasti. Tað sama við rørdum farsi og vanligum pylsum. Kann húsarhaldsfrøðingurin svara mær um tað veruliga er so?

*Uppskriftirnar uppá medistapylsu kunnu sjálvandi vera ymiskar. Eg setti omanfyrinevnda spurning til slaktaran í Miklagarði og hjá MBM. Báðir vóru sera avgjørdir og avvístu pástandinum um, at medistapylsa verður gjørd úr kjøtburturkasti. Í Miklagarði verður nýtt 2/3 svínakjøt og 1/3 neytakjøt, Hjá MBM verður bert svínakjøt nýtt. Tað er serliga kjøt frá bógvinum, sum verður nýtt til medistapylsu og rørt fars, sum faktiskt er sama deigg. Felags fyri medistapylsu og rørt fars er, at feittinnihaldið er umleið 20-25 %.*

MÁLFRØÐINGURIN

### Mjólkarspann og mjólkarpakki

Í orðasamansetingum skal onkuntíð eitt r ímillum, t.d. Mjólkarvirki. Eg havi stórar trupulleikar av hesum og veit rætt og slætt ikki, nær tað eigur at vera har og ikki. Kann málfrøðingurin greiða mær frá nær og hvar?

*Í sambandi við samansett orð plaga vit at tosa um stovnssamansetingar og hvørsfalssamansetingar. Í stovnssamansetingum hevur fyrra orðið onga ending, men í hvørsfalssamansetingum stendur fyrra orðið í hvørsfalli eintali ella fleirtali. Taka vit hvørkikynsorðið keyp sum dømi, er keypmaður stovnssamanseting, meðan keypsprísur er hvørsfalssamanseting. Orðið keyp endar við -s í hvørsfalli eintali, t.e. keyps, og tí fáa vit s millum keyp og prísur í keypsprísur.*

*Hvørsfall fleirtal endar altíð við -a, meðan hvørsfall fleirtal hevur ymiskar endingar. Sterkt bend kvennkynsorð, t.d. bygd, og summi sterkt bend kallkynsorð, t.d. vinur, enda við -ar í hvørsfalli eintali, t.e. ávikavist bygdar og vinar. Orðið mjólk er sterkt bent kvennkynsorð, og tað er bert eintalsorð; tað ber ikki til at tosa um fleiri mjólkir. Hvørsfalssamansetingar, har mjólk er fyrri liður, fáa sostatt altíð ar millum mjólk og seinna lið, t.d. mjólkarvirki, mjólkarpakki, mjólkarspann o.s.fr.*

*Orsøkin til at tað mangan er torført at gera av, um vit skulu hava ar ella a í hvørsfalssamansetingum, er, at hesin munur ikki er í talumálinum, sbr. mjólkarpakki, sum eigur at skrivast við r, men verður sagt, og eigur at sigast, við ongum r. Talan er sostatt um eina skriftmálsreglu burturav. Og tað er ikki altíð so lætt at gera av, um vit skulu velja eintal ella fleirtal. Eitt nú góðtekur Móðurmálsorðabókin bæði staðarnavn (hvørsfall eintal) og staðanavn (hvørsfall fleirtal). Skuldu vit fylgt reglunum til fulnar, t.e. at vit brúktu hvørsfall eintal, tá ið innihaldið er eintal, og hvørsfall fleirtal, tá ið innihaldið er fleirtal, áttu vit at skrivað staðarnavn, men staðanøvn, men tað hevði verið í so tvørligt. Í tílíkum førum velja vit vanliga eintalsformin, tí vit fata hann sum grundform.*

**Spyrjið serfrøðingarnar**

Hava tit spurningar til serfrøðingarnar, kunnu tit senda teir til:

**Sosialin**
postsmogu 76
110 Tórshavn

ella á fax: 314720
og teldupostadressuna:
spyr@sosialurin.fo

# Keypssamtøkan fær meiri pláss

**Handilin í Dr. Jakobsensgøtu verður umbygdur, so tað verður rúmligari í handlinum. Nú verður pláss hjá tveimum kundum við innkeypsvogni at møtast millum hillarnar**



*Heldur trongt er í løtuni í FK handlinum í Dr. Jakobsensgøtu, men eftir umbyggingina verður heldur rúmligari*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

UMBYGGING
*Stefan í Skorini*

Týsmorgunin 6. februar letur handilin hjá FK í Dr. Jakobsensgøtu uppaftur við nógvum góðum tilboðum. Tá verður umbyggingin liðug, og handilin verður meira kundavinarligur.

Fremsta endamálið við umbyggingini er at fáa meira pláss til viðskiftafólk og starvsfólk í handlinum.

Talan er um rættiliga stórar broytingar, sum verða framdar. Næstan alt innbúgvið verður skift. Bara eini 5-10% av gamla innbúgvinum verður brúkt umaftur, meðan restin er nýtt.

Bo Møller, leiðari av handlinum, sigur, at henda umbyggingin er hart tiltrongd, tí tørvur var á einum størri handli. Hann sigur, at umbyggingin nútíðarger handilin, og betri pláss verður hjá kundanum. Talan verður um eini 30 fermetrar, sum verða lagdir afturat gólvplássinum.

Bo sigur, at í meginpartinum av handlinum ber tað ikki til, at tveir innkeypsvognar møtast, tí pláss er ikki fyri tí. Eftir umbyggingina verður tað soleiðis, at vognar kunnu møtast í næstan øllum handlinum. Handilin verður við hesum nútíðargjørdur.

Handilin varð bygdur í 1972, og hetta er størsta umbyggingin, sum er framd síðani tað. Í 1978 og 87 vórðu stórar umvælingar framdar, men hetta er tann størsta. Í løtuni arbeiða fimtan fólk í handlinum.

Bo heldur, at henda umbyggingin er neyðug fyri at handilin skal yvirliva, og at tað er neyðugt at fylgja við tíðini.

Hann sigur, at handilin nú fer at leggja seg meira eftir at hava heitan mat til svangar magar. Til hetta endamálið hevur handilin fingið serligar diskar til matin.

Nú er handilin kúvendur, og kundin fer at ganga hinvegin runt í handlinum, tá hann kemur inn.